# Sum lús millum tvær negl

BJØRN KALSØ
løgtingsmaður



**Nú játtanin til inntøkutrygdina er uppi, og eingin eykajáttan er fingin enn, situr fiskimaðurin við svartaperi. Ein veiting, borgarin sambært lóg hevur rætt til, verður ikki goldin, tí landsstýrismaðurin er bangin fyri at koma í stríð við aðra yvirskipaða lóggávu.**

**Inntøkutrygd**
Neyvan nakar fiskimaður ynskir at dúva uppá inntøkutrygdina, tí tað er hon ikki nóg gevandi til. Men í eini støðu, tá fiskiskapurin er vánaligur og fiskaprísirnir lakir, er skipanin góð hjálp. Síðan kreppuna í 90-unum, tá kassin mangan var tómur og fiskimenn bíðaðu í mánaðir eftir útgjaldi vegna regulert peningatrot, hevur skipanin í stóran mun virkað væl. Men nú er aftur galið. Játtanin er langt síðan uppi, eykajáttan nústani løgd fyri Løgtingið, og einki útgjald til fiskimenn, sum frammanundan eru illa sperdir í hesum døgum.

**Lús millum tvær negl**
Leingi hevur verið greitt, at játtanin til inntøkutrygdina ikki fór at halda í ár. Kortini er umbønin um eykajáttan, sum kundi tryggja fiskimanninum rættstundis útgjald, nústani komin í Løgtingið.

Sum tíðin hevur gingið er játtanin uppi, við teirri avleiðing, at inntøkutrygdin ikki verður útgoldin, sum vanligt hevur verið og soleiðis, sum borgarin hevur rætt til at fáa hana útgoldna. Hetta er sera óheppið og setir fiskimannin í eina ringa støðu.

Í samband við ófráboðaðan fyrispurning á Løgtingi mikudagin 9. sept. kom fram, at landsstýrismaðurin ikki metti seg hava heimild at gjalda út peningin, tí stýrisskipanarlógin ásetir, at eingin útreiðsla má verða hildin uttan játtan fyriliggur.

Fiskimaðurin er sostatt komin at liggja sum lús ímillum tvær negl í hesum sera óhepna máli. Í fyrsta lagi í sínum lógarfesta rætti at fáa pening útgoldnan, og í øðrum lagi í samband við ræðsluna hjá landsstýrismanninum fyri at gjalda út, við atliti til ásetingarnar í stýrisskipanarlógini og vandanum fyri "at missa høvdið".

Ein áhugaverdur løgfrøðiligur spurningur, sum sjaldan verður viðgjørdur og enn minni loystur, ofta til stóran trega fyri borgaran.

Løgið kortini, at lítið og einki hoyrist millum manna um trupulleikan. Øðrvísi er, tá aðrir bólkar ikki fáa tað tey eiga. Feskastu dømini eru, tá onkur "Við Múrin" ikki fekk "hýru", ella tá tosað varð um, at onkur annar ikki skuldi fáa ta lønarhækkan honum stóð í væntu.

Nei, fiskimaðuri er ikki kendur fyri at gera um seg í almenninginum, men harfyri eigur hann sín rætt.

**Støðan ikki haldbar**
Longu nú eru fleiri fiskimenn, ið ikki hava fingið inntøkutrygdina frá tí almenna, sum teir sambært lóg hava rætt til, og sum vanligt hevur verið. Sum dagar, vikur og mánaðir ganga, verða tað fleiri, ið leggjast aftrat og upphæddirnar vaksa.

Landsstýrismaðurin hevur arbeitt við eykajáttan, sum nústani er løgd fyri Løgtingið. Av royndum kann sigast, at viðgerðir av eykajáttanaruppskotum á Løgtingi taka í minsta lagi vikur, tó oftast mánaðir. Tí fer rúm tíð at ganga, áðrenn nakað verður útgoldið, um landsstýrismaðurin heldur fast við støðu sína.

Fari tí at enda at heita á landsstýrismenninar í ávikavist fiskivinnu- og figgjarmálum um at bera so í bandi, at fiskimaðurin sum skjótast fær peningin, hann eigur og hevur rætt til at fáa. At grava seg niður millum ásetingarnar í mótstríðandi lógarásetingum, har borgarin liggur ímillum við svartaperi, er ikki haldbar støða.

# Besti skúlin til børnini

EYÐGUNN SAMUELSEN
løgtingskvinna



Bygnaðurin í okkara fólkaskúla hevur verið óbroyttur í nógv ár. Meðan stórar broytingar eru hendar í samfelagnum. Krøvini til útbúgving hjá børnum og ungum eru nógv økt, eins og vit í dag seta krøv til fleiri og øðrvísi førleikar hjá læraranum.

Øll foreldur vilja geva sínum børnum so góða barlast sum gjørligt at fara út í lívið við, tað sama vilja allir lærarar geva sínum næmingum.

Hvussu geva vit børnunum tann besta førningin, bæði fakliga og trivnaðarliga, eigur at vera meginreglan í øllum tillagingum, ið vera gjørdar í fólkaskúlanum.

**Fólkaskúlin í dag**
Tað eru 140 færri børn í fólkaskúlanum í 2009 enn í 2008. Játtanin í 2009 er 271 mió, hetta er øking á 13 milliónir í mun til 2008. Hóast ein partur er lønarhækkingar, er tað vert at seta spurningin, fáa næmingarnir nokk fyri peningin?

Ber til, at skipa skúlan øðrvísi, so meira fæst fyri hesa upphædd. Haldi at tíðin er komin at seta hesar spurningar.

**Stórt er ikki altíð best**
Eri als ikki samd við teimum, ið halda, at stórar eindir bara eru tað besta. Eri heldur ikki samd í, at bert støðd á játtan skal stýra, hvat ið vit gera á fólkaskúlaøkinum.

Størsta týdningin hevur læringin og trivnaðurin hjá barninum. Tað merkir eisini, at lærararnir fáa góðar umstøður at geva børnum okkara tað besta, ið tey eru ment, bæði av fakligum innihaldi og sosialum førleikum.

Ein lærari við fimm børnum gevur børnunum tað besta, ið hon kann. Eri onga løtu í iva um, at hetta kann vera líka so góð undirvísing, sum á einum stórum skúla við nógvum næmingum og fleiri lærarum. Tað er tó ein sannroynd, at vit læra ikki bara í einrúmi saman við einum lærara, vit læra eisini í felagskapi við onnur. Størri skúlar geva, mest sannlíkt, betur møguleika fyri einum fjølbroyttum felagsskapi.

**Skúlaøkir**
Ljóðar, í grein í bløðunum, at skipanin við skúlaøkjum merkja færri skúlar, hetta er ikki heilt rætt. At skipa, til dømis Norðoyggjar í eitt skúlaøki merkir, at allir skúlarnir eru ein bygnaðarlig eind við einari leiðslu, og ikki sum í dag fimm eindir. Sostatt er talan um at leggja skúlar saman.

Mannagongdin verður tann, at kommunurnar gera eina avtalu um at skipa allar skúlarnar í eitt skúlaøki. Síðan avgera tær í felag, hvussu henda eindin verður best skipað.

Velja kommunurnar í Norðoyggjum til dømis ikki at nýta ein skúlabygning til vanliga undirvísing, so kundu tær ístaðin avgjørt at nýtt henda bygning til heildagstilboð til næmingar, ið hava ein serligan tørv. Hetta er eitt tilboð, ið vanligi skúlin ikki í dag kann geva. Soleiðis kann játtanin til skúlan við øðrvísi bygnaði nýtast til at geva næmingum fleiri og betri tilboð, enn teir fáa í dag.

**Kommunurnar við**
Tað eru kommunurnar, ið skulu gera sínamillum avtalu um, hvussu skúlin skal skipast í økir, fæst politisk semja um at skipa landið í skúlaøkir. Tí er tað sjálvsagt, at tær skulu við í tilgongdina. Eri sannførd um, at politiski myndugleikin ferð at viðgera allar møguligar broytingar á økinum, í samráð við kommunur, Lærarafelagið og øll, ið varða av skúlanum.

# Hvat óttast landið?

GUNVÁ VIÐ KELDU
borgarstjóri



**Royndirnar higartil vísa, at tey málsøki, har kommunurnar hava fingið fulla ábyrgd, verða umsitin munandi betur, enn tá ið antin landið ella land og kommunur í felag hava tvíbýtta ábyrgd**

Eg má siga, at eg undrist á almennu úttalilsini hjá formanninum í Føroya Lærarafelag, har hann sigur seg hava broytt meining og nú heldur, at landið einsamalt skal umsita allan fólkaskúlan.

Innan fleiri málsøki hava vit higartil havt ringar royndir av landinum sum umsitara, og tí er hetta ynskið hjá lærarafelagsformanninum ikki til at skilja.

Um vit hugsa um eldraøkið, sum landið nú í árátiggjur hevur havt ábyrgdina av, er tað sjón fyri søgn, at støðan er sera ring og óvirðilig fyri okkara eldru borgarar.

Henda støða hevur gjørt, at kommunurnar kring landið hava kent seg noyddar at taka um endan og brúka pening upp á hetta málsøkið, sum landið framvegis hevur og eftir øllum at døma vil hava, heldur enn at lata kommununum fulla ábyrgd, og pening, til endamálið.

**Barnaansingin og barnavernd**
Barnaansingin, sum fyrr var tvíbýtt ábyrgd hjá landi og kommunum, varð í 2000 løgd út til kommunurnar at hava 100% ábyrgd av, og sigast má, at vit síðani hava sæð eina stóra menning á økinum, sum kanska ongantíð fyrr er sædd her á landi.

Kommunurnar hava á hesum málsøki prógvað, at tær eru egnaðar og førar fyri at umsita málsøki, samstundis sum landið umvegis lógarverk og eftirlit ásetur minstukrøv og tryggjar eitt nøktandi støði kring alt landið.

Líknandi skipan er í dag galdandi fyri barnaverndarøkið, og aftur her hava kommunurnar prógvað, eisini í sera góðum sínamillum samstarvi, eitt nú í sambandi við Barnaverndarstovuna, at tær eru dugnaligir umsitarar av teimum málsøkjum, sum hava við borgarar teirra at gera.

**Illa umhugsaðar landsstýrisavgerðir**
Tað, sum hinvegin ger bæði kommunurnar og allarmest borgararnar ótryggar, er tann vantandi linjan í politikki landsstýrisins, har brádligar avgerðir verða tiknar um broytingar, sum órógva og lemja skipanirnar.

Eitt nú hevur landsstýrið herfyri, ógvuliga brádliga og uttan fráboðan frammanundan, flutt umstigingina av barna- og brekøkinum frá Almannastovuni til Nærverkið.

Hetta hendir, samstundis sum ein bólkur, sum land og kommunur hava sett, arbeiðir við júst hesum málsøkjum, og har flyting til kommunurnar er ein av møguleikunum.

Slíkar brádligar avgerðir eru ikki til frama fyri tryggleikakenslu borgaranna, og enn meira óskiljandi er tað, at slíkt verður gjørt og framt, meðan ein arbeiðsbólkur situr og lýsir málsøkið.

**Eitt valdømi og fleiri øki til kommunurnar**
Hesi seinnu árini hevur nógv verið tosað um at lata kommununum fleiri málsøki at umsita, men ikki kann sigast, at nógv ítøkiligt er komið burturúr. Tó eru, sum nevnt, nøkur framstig hend, eitt nú innan barnaansing og barnavernd.

Eg vil í hesum sambandi minna okkara landspolitikarar á, at tá ið Føroyar vórðu skipaðar sum eitt valdømi, varð undir viðgerðini sagt sum ein fortreyt fyri hesi kollveltandi broyting, at fleiri málsøki "afturfyri" skulu leggjast út til kommunurnar.

Tað kann ikki passa, at hetta lyfti longu nú er gloymt.

**Hvat er tað landið óttast?**
Eingin ivi er um, at vit hava eina frálíka skipan fyri myndugleikarnar í samfelag okkara, har Føroya Løgting ger lógirnar, Føroya Landsstýrið fremur hesar og hevur eftirlit, meðan kommunurnar, sum eru tættast at borgarunum, eru og eiga at útinna og umsita borgarans tænastur.

Henda skipan tryggjar, at tann fremjandi myndugleikin kemur nærri borgarunum, samstundis sum at hetta skapir ein dynamikk í økjunum kring landið.

Tí verður tað spennandi at síggja, hvat umskiparnevndin, sum arbeiðir við nýggjum kommunureformi, fer at koma við nú í heyst.

Kommunurnar hava prógvað, at tær eru førar fyri at umsita sínar borgarar, og tí eigur landið at hava fult álit á kommununum.